tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 49 Fríggjadagur 10. mars 2000 74. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 10,00

# Hernaðarmálið verður trumfur

Landsstýrið hevur gjørt eina meting av, hvussu nógvar pengar danir hava spart í hernaðarútreiðslum, tí teir hava brúkt Føroyar sum ein part av gjaldinum. Hendan útrokning skal brúkast í samráðingunum við danir

**Síða 5**



*Danir hava eftir øllum at døma spart pengar við at lata NATO hava hernaðarstøð í Føroyum. Landsstýrið ætlar at krevja endurgjald fyri hetta*



## Vilja sjálvstýri eftir øðrum leisti

Tað, sum skilir Javnaðarflokkin frá samgonguni í fullveldismálinum, er millum annað, at samgongan vil taka fullveldi í einum, meðan Javnaðarflokkurin vil loysa stig fyri stig

**Síða 4**



## Tær hildu kvinnudagin

Undirtøkan var góð, tá Kvinnufelagið í Havn skipaði fyri haldi í sambandi við altjóða kvinnudagin

**Síða 8**

## Vit eru snýtt fyri kvarta milliard



Formaðurin í Lærarafelagnum vísir á, at landsstýið hevur fingið pening frá danska statinum fyri læraralønir í Føroyum. Men tað hevur bert rindað ein part út aftur

**Síða 3**


*Konfirmatión, várið 2000*

**Halt konfirmatiónina heima - matin fært tú úr Perluni.** Ynskir tú at halda eina góða konfirmatión fyri barni tínum, so ber tað væl til at halda hana alla heima, uttan tær nýtist at hugsa alt ov nógv um matin. Heimið er tað staðið, har hugnin hoyrir heima. Tú ringir bara til Perluna og bíleggur eftir hesi matskrá - og tú hevur spart tær nógv stríð og pengar.

**FORRÆTTIR**

**Aspargessuppa** við heimabakaðum breyði

**Klár suppa** við kjøt- og mjølbollum og flute

**Rækjubland** við flute og smøri

**HØVUÐSRÆTTIR**

**Fleskasteik** við reyðkáli, agurkusalati, hvítum og brúnkaðum eplum og sós

**Heilstoktur oksaháryggur** við grønmeti, agurkusalati, súltutoyi, hvítum eplum og brúnari sós

**Heilstoktur oksaháryggur** við rómastúvaðum eplum, salati og reyðvínssós

**Lambasteik** við reyðkáli, agurkusalati, súltutoyi, hvítum og brúnkaðum eplum og sós

**OMANÁ**

**Íslagkøka** við vaflum

**Frísk fruktsalat** v/rákremi

**Heimagjørd triffli**

Perlan TEL 31 50 61

**PRÍSIR:**

Høvuðsrættur...... **80,-**

2 rættir.... **95,-**

3 rættir... **110,-**

**Levering bert í Suðurstreymoy!**



SANSIR · TEL 355 355